LM-099/2023

Fylgiskjal 54

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tórshavn, 23. februar 2024

Hoyringarsvar frá Hagafelag Føroya til Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Alment
Yvirskipað fegnast Hagafelagið um lógaruppskotið. Hagafelagið varð stovnað fyri skjótt 5 árum síðani júst við tí í hyggju at tryggja atgongdina til náttúruna og rættin til at hava eitt virkið og heilsugott lív í haganum, úr fjøru niðan á fjallatind. Harumframt arbeiðir felagið fyri at verja náttúruna.

Serliga fegnast Hagafelagið um, at lógin staðfestir rættin hjá fólki at ferðast frítt í náttúruni (grein 3). Í praksis hava føroyingar altíð gingið í náttúruni, men tað er eitt framstig, at hesin rættur nú er staðfestur í lóg. Tó at tað í flestu førum er og hevur verið gott samstarv millum partarnar, sum brúka náttúruna (gongufólk og bøndur), er alneyðugt at tryggja rættin í lóg. Seinastu árini hava føroyingar upplivað alsamt fleiri forðingar og keðiligar hendingar, tá ið teir hava leitað sær í hagan. M.a. eru fólk meldað fyri at fara túr í hagan, og onnur hava fingið ákoyringar. Í dag er tað ikki nóg mikið bara at *siga*, at føroyingar ganga frítt. Neyðugt er at hesin rætturin er lógarfestur. Fólk mugu vita við vissu, at tey ikki enda á ákærubonkinum, bara tí tey fara ein túr út um bøgarðarnar.

Hagafelagið skal minna á, at í londunum, vit vanliga samanbera okkum við, er rætturin at ferðast í náttúruni støðugt styrktur. Londini ásanna, at náttúran hevur stóran týdning fyri heilsuna hjá fólki, og at tað er ein grundleggjandi rættur fyri fólkaræði at hava atgongd til náttúruna.

Felagið fegnast eisini um, at gjaldsportur og líknandi forðingar verða bannað (grein 12). Vit eiga at hava somu skipan, sum í okkara grannalondum, har einum og hvørjum (bæði lokal og útlendingar) er heimilað at ferðast frítt – við ábyrgd. Nevnast kunnu m.a. Noreg, Svøríki, Finland, Ísland, Skotland umfamt onnur lond. Hóast londini eru størri enn Føroyar, eru einstøku økini og oyggjar/oyggjabólkar í hesum londum eisini partur av hesum rættinum. Eisini í londum, sum formliga ikki hava alramannarætt, t.d. Danmark, eru víðar heimildir at ganga. Skilið við gjaldsportrum, píkatráði og skeltum, sum vit hava sæð í Føroyum seinastu árini, kemur at kalla ikki fyri í londum í okkara parti av heiminum. Er talan um gjald í onkrum føri, kann tað vera tá ið talan er um tjóðarlundir (nationalparkir).

Bóndur og festarar hava nógvar møguleikar at bjóða tænastur, um teir vilja gerast partur av ferðavinnuni. Ognarrætturin/festirættur og gongurætturin er hvør sítt og skulu ikki knýtast saman.

Hagafelagið tekur undir við, at eitt náttúrugjald verður tikið inn (grein 13) Tó eiga pengarnir sum heild at verða brúktir til at gera gøtur, endurbøta náttúru og avmarka fótafar hjá ferðandi. Tað er ikki rætt at partur av náttúrugjaldinum pr automatikk fer í lumman hjá festarum/jarðeigarum uttan krav um, at peningurin skal brúkast til náttúruna. Tað er dýrt at gera og umvæla gøtur, og tí eigur at umhugsast at lata náttúrugjaldið vera hægri og/ella at

peningur verður settur av á fíggjarlógini til at byrja at gera tær gøtur, sum hava størstan tørv á umvæling.

Hagafelagið er tó ivingarsamt um nakrar av lógargreinunum - serliga grein 6 (Ferðavinnuætlan), 9 (Skilhaldsreglur) og 11 (Trygd). Felagið metir, at partar av hesum greinunum seta óneyðugar avmarkingar fyi føroyingar.

Fyri Hagafelagið hevur tað alstóran týdning, at ásetingar í ferðavinnulógini, ið eru ætlaðar til at skipa ferðavinnuna, ikki skerja rættindini hjá føroyingum, sum í ættarlið hava haft fría atgongd til náttúruna. Landsstýrismaðurin eigur at gera týðiligan skilnað við ásetingunum í grein 6, 9 og 11, soleiðis at tær burturav eru galdandi fyri vinnuliga ferðavinnu og ikki fyri "ein og hvønn", soleiðis sum ásett er í § 3 í ferðavinnulógini.

Summar av lógargreinunum fara ov langt í eftiransingarhugburði. Flestu føroyingar kenna náttúruna væl og virðiliga og duga sjálvir at meta um møguligar trygdaravbjóðingar.

Tað er av avgerandi týdningi, at landsins borgarar kunnu ganga frítt í føroysku náttúruni. Landsstýrismaðurin hevur skyldu at tryggja, at siðvenjan hjá føroyingum at ganga og uppihalda sær í náttúruni ikki verður skerd av ásetingum í hesi lógini (t.d. í lokalu ferðavinnuætlanunum ella ásetingum um trygd). Føroyingar mugu við nýggju lógini hava betri tryggjaði rættindi at fara út í náttúruna - og mugu undir ongum umstøðum fáa verri rættindi!

Atlit til trygd er sjálvsagt grundleggjandi, men tað má vera samsvar millum førleikar og trygdarampa. Nógv støð kunnu so ella so metast at vera vandamikil, um vit og skil ikki verður brúkt. At lógin letur upp fyri, at ferðavinnuætlanir kunnu steingja leiðir t.d. knýtt at veðri og árstíð tykist at fara alt ov langt í mun til at skerja grundleggjandi fríu atgongdina til náttúruna hjá fólki í Føroyum. Grundreglan má vera, at í minsta lagi føroyingar hava ábyrgd av sær sjálvum, eins og meginreglan eisini er í hinum norðurlondum. Í aðrar mátar ber til at geva týðiliga leiðbeining til ferðafólk um farleiðir og atburð í náttúruni. Fyri óroynd ferðafólk kunnu reiðiliga nógv støð í Føroyum verða óegnað at ferðast í uttan ferðaleiðara.

Skulu leiðir avmarkast/skerjast orsakað av atliti til náttúruna, skal hetta gerast samsvarandi Náttúruverndarlógini og serkønum myndugleikum.

Hagafelagið metir, at kommunur og staðbundna nevndin ikki einsamallar er rætti myndugleiki til at meta um, hvørjar avmarkingar ella reglur tørvur er á at seta í verk grundað á tørvin á at verja sárbæra náttúru ella djóralív. Her skal heldur skikkaður mynduleiki saman við staðbundnum fólki kunna meta um og taka støðu sambært náttúruverndarlógini.

Ítøkiligar viðmerkingar til lógaruppskotið:

Til Kapittul I Almennar viðmerkingar
Viðv. síðu 5, seinasta reglubrot. Hagafelagið er ivasamt viðv. páhaldinum um at javnseta føroyingar við útlendingar. Hagafelagið uppfatar ikki hagagongd hjá føroyingum sum verandi ferðafólk. Tað er óvanligt at nevna føroyingar ferðafólk, men brúka meiri orðingina ferðast í egnum landi.

Til Kapittul II Avleiðingar av uppskotinum

Á síðu 7 undir **Avleiðingar umhvøvið** stendur m.a. "*Aftur at hesum er ferðavinnuvirksemi, sum – vegna talið av ferðafólkum aleina – kann hava munandi størri ávirkan enn annað vinnuligt virksemi*". Hetta er ein pástandur, sum hongur eitt sindur í leysari luft. Tað er greitt, at fótafarið frá fólki ávirkar náttúruna. Men tað er samstundis púra greitt, at landbúnaðarvirksemið eisini hevur stóra ávirkan á náttúruna. Seyðahaldið er umfatandi, og sambært lívfrøðingum, hevur seyður troðkað plantur og annan vøkstur burtur. Eisini hevur ovurbit frá seyði við sær jarðriv (erosión), sum sæst ymsastaðni í náttúruni. Lendisakfør, hegn og annað, sum er knýtt at landbúnaði, ávirka náttúruna neiliga. Vit vita eisini, at virksemi hjá landi, kommunum og vinnufyritøkum gera stór intriv í náttúruna - bygging, grótbrot o.a.

Landsins myndugleikar eiga altíð at taka ávirkanina á náttúruna í álvara, bæði frá ferðavinnu, landbúnaði, bygging og øðrum vinnuvirksemi - og taka neyðug stig til at avmarka/steðga neiligu árinunum.

Síða 9 (niðast). Har stendur: "*Landsstýrismaðurin fær eftir § 11 heimild at áseta reglur um, at tað í økjum, har tað er serliga vandamikið at ferðast, bara skal vera loyvt at ferðast við staðkendum ferðaleiðara, og at serliga vandamikil øki av trygdarávum skulu vera stongd fyri ferðslu ávísa tíð á árinum ella samdøgrinum.*" Sum áður nevnt í hesum hoyringarskrivi (á síðu 2) metir Hagafelagið, at farið verður alt ov langt í eftiransingarhugburði. Føroyingar flest eru kunnugir við sítt land og duga sjálvir at skyna á vandum. Greinin kann verða galdandi fyri vinnuliga ferðavinnu.

Ósamsvar er millum støddina á náttúrugjaldinum. Á síðu 6 er tað 150 kr, meðan tað á síðu 9 er 120 kr.

Til Serligar viðmerkingar - lógargrein og tilhoyrandi viðmerkingar

Til § 1. Endamál

Tað tykist vera andsøgn millum orðingina í § 1, stk. 1, 1 pettið viðv. at "Ferðavinna skal... skipast á burðardyggum grundarlagi til tess at tryggja fólkaræði, frælsi, trivnað, inntøkur og vinnumøguleikar hjá fólkinum kring landið við at...." Meðan viðmerkingarnar til §1 ovast á síðu 11 siga, at "...ferðavinna skal vera eitt týðandi íkast til samfelagsbúskapin við at skapa inntøkur, virksemi og trivnað kring landið." Viðmerkingarnar geva fatan av, at ferðavinnan burturav er endamálið og nevnir ikki endamálini í pkt. 1 og 2 um at verja náttúru, tilfeingi og siðvenju og styrkja staðbundin samfeløg, mentan og mentanararv, ið lógargreinin ásetur.

Til § 2. Allýsingar

Orðingin í § 2, stk. 2 um at landsstýrismaðurin kann tulka, er heldur óvanlig í lógarsmíði. Vanligt er, at stjórnarráð kunnu tulka lóggávu á økinum hjá avvarðandi landsstýrismanni.

Til § 3.

Hagafelagið fegnast um, at tað er einum og hvørjum er frítt at ferðast. Í praksis hava føroyingar gingið í náttúruni í ættarlið, men tað er avgerandi, at hesin rættur nú verður staðfestur í lóg.

Til § 4. Atburður
Viðm. Møguligar avmarkingar av atgongd til náttúruna skulu vera proportionellar og við atliti at náttúruni, umframt at rímiligum og veruligum tørvi til at útinna ávíst virksemi ávísan dag, og har virksemið kann verða beinleiðis órógvað, t.d. í sambandi við fjallgongu. Hinvegin skal tað ikki bera til at lata hagar fullkomiliga aftur í longri tíðarskeið, t.d. í lembingar- og harutíð, sum hevði útihýst atgongd hjá almenninginum til náttúruna í órímiligan mun.

Flestu føroyingar vita, at man er eyka varin í lembingartíð, tí vit eru von við at hava seyðin nærhendis bústøðum og vegi í lembingartíð. Ferðafólk kunnu kunnast um, at seyður í Føroyum lembir úti, og at hann skal hava frið í hesum tíðarskeiði.

Viðv. stk. 1. Hagafelagið mælir til, at orðingin "..til ampa" verður broytt til "...til órímiligan ampa" og til somu broyting í stk. 5 og í viðmerkingunum.
Viðv. stk. 2. Hagafelagið mælir til at broyta orðingina til "..á vøtnum og tjarnum. Á tjarnum er tó bert loyvt at rógva við flakum, gummibátum, kajakk o.l."
Viðv. stk. 3. Eru blómur fevndar av hugtakinum "gróður"?
Hagafelagið mælir til, at loyvt verður at seta upp tjald styttri tíðarbil, t.d. 2 dagar á sama stað (sum t.d. er ásett í Noregi og Svøríki). Her kunnu reglur gerast um fjarstøðu til bústað, soleiðis at tjalding ikki órógvar tey, sum búgva í økinum.

Til § 5.
Hagafelagið metir, at tað ikki tykist greitt, hvørt eigari ella brúkari kann krevja gjald fyri handilsligt virksemi, tá ferðafólk fara í hagan uttan ferðaleiðara ella aðra tænastu. Í viðmerkingunum til § 5 verður nevnt, at "Avtalan forðar ikki fyri, at eigari ella brúkari veita sama fyriskipara aðrar tænastur fyri gjald." Fyri at eingin ivi skal vera um, hvat ið er galdandi, mælir Hagafelagið til, at meginreglan um, at gjald bert verður veitt fyri tænastu, verður skrivað inn í lógartekstin undir § 5.

Til § 6. Ferðavinnuætlan
Tað er sera ymiskt, hvussu nógv ferðafólk vitja í kommununum kring landið, og tí mælir Hagafelagið til, at orðingin "skulu" í fyrstu reglu í § 6, stk. 1, verður broytt til "kunnu".

Hagafelagið metir, at tað ikki er nóg greitt, um ásetingar og avmarkingar í § 6 eisini eru galdandi fyri ein og hvønn, ið sambært § 3 ikki er partur av handsligari ferðavinnu.
Tað eru nakrar fáar bygdir og nøkur fá náttúrustøð í Føroyum, sum higartil hava verið órógvað av nógvum ferðafólkavitjanum. Sannlíkt eru tað tí nøkur fá støð, har tørvur er á at gera gøtur yvir longri strekkir - serliga í sonevndum 'Instagram-støðum' sum t.d. til Kallin, Trælanípuna og Slættaratind. Tað krevur tíð og orku at gera ætlanir. Hagafelagið mælir tí til, at ferðavinnuætlanir verða gjørdar fyri økir/bygdir, so hvørt tørvur er á at skipa ferðafólkavitjanir.

Hagafelagið heitir staðiliga á landsstýrismannin, um at broyta ásetingarnar og avmarkingarnar í § 6 til einans at fevna um handilsliga ferðavinnu og ikki um gongurætt hjá einum og hvørjum, sambært § 3. Landsstýrismaðurin hevur skyldu at tryggja, at føroyingar ikki verða verri stillaðir enn í dag til atgongdina til náttúruna, orsaka av ásetingunum í ferðavinnulóggávuni. Flestu føroyingar, ið eru virknir í fjøllunum, hava royndir og duga sjálvir at meta um, hvat umstøðurnar krevja. Tað er ongin grund til at gera ásetingar í lóg um hesi viðurskifti.

Onnur atlit til sárbæra náttúru eigur landsstýrismaðurin at lata skikkaðar myndugleikar, sum sambært Náttúruverndarlógini ella aðrari viðkomandi lóggávu kunnu meta og gera reglur um, hvussu fólk skulu bera seg at í sárbærum økjum.

Í hinum norðurlondunum er gerð av gøtum fremsta tiltakið, ið verður brúkt til at skipa gongd í økjum við nógvum ferðafólkavitjanum. Teirra royndir vísa, at tá gøtur verða gjørdar, ganga fólk heldur eftir gøtunum enn við síðuna av teimum.

Soleiðis sum ferðavinnuætlaninar verða lýstar undir § 6, tykjast ásetingarnar pkt. 3-5 órímiligar, og vandi er fyri, at reglugerðir fara at gera ov stórt inntriv í rættin hjá føroyingum til at verða virkin í náttúruni.

Ítøkiliga verður mælt til at orðini "almenn ferðsla" í § 6, stk 2, nr. 3 verður broytt til "ferðsla ísv handilsliga ferðavinnu", fyri at sleppast kann undan, at gøtur og farleiðir verða stongdar fyri føroyingum. Mælt verður somuleiðis til, at orðingin í § 6, stk, 2, nr. 4, um at ferðavinnuætlanir skulu áseta, hvar tað er neyðugt at hava ferðaleiðara/staðkendan ferðaleiðara, ikki skal fevna um føroyingar.

Eitt hugsað dømi, sum kann lýsa møguligar avleiðingar av ferðavinnuætlanunum, um ásetingarnar eisini skulu galda fyri føroyingar: Tað er hugsandi, at ein gøta verður gjørd frá Trøllanesi norður til Kallin. Um ásetingar í ferðavinnuætlanini ella í skilhaldsreglunum siga, at í økinum norðan fyri Trøllanes er bert loyvt at fylgja gøtuni, og at hendan ásetingin er galdandi fyri øll, fer ásetingin at forða føroyingum í at fara niðan á Borgaran. Tað hevði verið ein fullkomiliga órímilig avleiðing fyri frælsið hjá føroyingum at ferðast í náttúruni og eitt sera stórt inntriv í okkara rættindi til at íðka og verða virkin í náttúruni. Nevnast kann, at bæði ung og eldri fólk í Føroyum seta sær fyri at røkka allar 340 fjallatindar í Føroyum. Eitt ítriv, sum hevur ómetaliga stóran týdning fyri trivnað og heilsu hjá fólki: Knýtt verða vinarbond, kropsliga og sálarliga heilsan gerst betur, og betri kunning til djóralív og landalæru finst valla. Tilknýti og alskur til náttúru og land verður somuleiðis styrktur, tá fólk uppihalda sær og ferðast í náttúruni.

Tað hevði verið sera óheppið, um kommunur við ásetingum í ferðavinnuætlanum, stongdu av fjøll, tí mett verður, at tað er ov vandamikið at fara niðan á hesi fjøll. Hagafelagið heldur tí, at ásetingar í ferðavinnuætlanini bert eiga at fevna um handilsliga ferðavinnu, soleiðis at føroyingar framvegis kunnu vitja fjøll og onnur støð í haganum í friði og náðum.

Í § 6, stk. 2, pkt. 1 verður ásett, at ferðavinnuætlanin skal lýsa almennar farleiðir, meðan tað í pkt. 2 er ógreitt, um gøturnar, ið verða nevndar, her eisini eru almennar. Í viðmerkingunum til § 6 verða bert nevndar farleiðir, økir og gøtur, har ein og hvør hevur frítt at fara (s. 14, 4. reglubrot). Hagafelagið heldur, at orðingin í pkt. 2 eigur at verða orðað soleiðis, at ongin ivi er um, at gøtur, ið verða gjørdar til ferðafólk, eru almennar. Almennu viðmerkingarnar í reglubroti 4 á síðu 5 stuðla eisini hesi fatanini. Har stendur at:

"Ferðafólk, sum koma til Føroya, skulu rinda eitt náttúrugjald, sum verður brúkt til at fíggja kostnaðin av hesum undirstøðikervi…Hetta undirstøðikervi er ókeypis hjá einum og hvørjum at brúka…"

Viðv. § 6, stk. 2, pkt. 3, 4 og 5 í viðmerkingunum á síðu 14-15
Viðmerkingar tykjast at hava ein heldur avmarkandi hugburð og eru í ósamsvari við § 3 í lógaruppskotinum. Hagafelagið metir, at ferðavinnuætlanir eiga at raðfesta gøtur í náttúruøkjum, har nógv ferðafólk koma, fyri á tann hátt at bøta um fótafar av ferðavinnuni. Atlit til trygd er sjálvsagt grundleggjandi, men tað má vera samsvar millum førleikar og trygdarampa. Nógv støð kunnu so ella so metast at vera vandamikil, um vit og skil ikki verður brúkt. At lógin letur upp fyri, at ferðavinnuætlanir kunnu steingja leiðir t.d. knýtt at veðri og árstíð er at fara alt ov langt í mun til at skerja grundleggjandi fríu atgongdina til náttúruna hjá fólki í Føroyum. Grundreglan má vera, at í minsta lagi føroyingar hava ábyrgd av sær sjálvum, eins og meginreglan eisini er í hinum norðurlondum. Í aðrar mátar ber til at geva týðiliga leiðbeining til ferðafólk um farleiðir og atburð í náttúruni. Fyri óroynd ferðafólk kunnu reiðiliga nógv støð í Føroyum verða óegnað at ferðast í uttan ferðaleiðara.

Uppskotið um at gera torleika- og váðametingar við tilhoyrandi litmerktum leiðum í mun til torleikastig, tykist heldur óneyðuga ambitiøst og orkukrevjandi (miðskeiðis á síðu 14). Tí tað eru fá ferðafólk, ið leita aðrar vegir enn til tey áður nevndu instagramstøðini. Tí er ein tílík verkætlan at rokna sum at skjóta spurv við kanón. Fólk búsitandi í Føroyum hava í stóran mun skil fyri at ganga í ólendi og hava ikki tørv á, at onnur gera torleika- og váðametingar fyri tey.

At nýta bútíðina hjá fugli ella slit orsakað av gongd sum grundgeving fyri at steingja ávísar farleiðir ella ávís øki partar av árinum/samdøgrinum eigur at vera ein spurningur, ið skikkaðir myndugleikar eiga at taka støðu til grundað á ásetingar í Náttúruverndarlógini, og ikki einans kommunur ella staðbundnar nevndir.

Ítøkiligar viðmerkingar til § 6, stk. 2
Viðv. stk. 2, nr. 2. í § 6: Vísandi til fyrstu viðmerkingarnar í hesum skrivi undir § 6, er Hagafelagið í iva um, hvør kemur undir hugtakið 'ferðafólk'. Ferðavinnuætlanir eiga ikki at raka frælsið hjá "einum og hvørjum frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini" sambært § 3. Hagafelagið mælir til at ásetingin um "...sbr. eisini § 3" verður strikað, um hon byggir uppundir, at føroyingar eisini verða fevndir av stk. 2, nr. 2.

Viðv. stk. 2, nr. 3. Hagafelagið mælir til, at føroyingar ikki eru fevndir av ásetingum í Ferðavinnuætlanunum.

Viðv. stk. 2, nr. 4. Hagafelagið mælir til, at føroyingar ikki eru fevndir av ásetingum í Ferðavinnuætlanunum.

Viðv. stk. 4. Hagafelagið tekur ikki undir við, at kravt verður, at føroyingar skulu hava ferðaleiðara.

Viðv. § 6, stk. 3 mælir Hagafelagið til, at allar ferðavinnuætlanir skulu til hoyringar sambært Ll. nr. 70 frá 2023 um náttúruvernd ella aðrar viðkomandi lógir, áðrenn tær verða góðkendar av landsstýrisfólkinum.

Til § 7. Serstøk nevnd hjá heimafólki
Ongar viðmerkingar.

Til § 8. Farleiðir
Ásetingin er í lagi, men eigur primert at vera viðkomandi, har tørvur er á tí, og serliga á leiðini niðan frá bygd ella innangarðsøki.

Hagafelagið væntar ikki, at ferðavinnugjaldið til kommunurnar røkkur til at nøkta verandi tørv á at gera gøtur til tey mest vitjaðu støðini fyrstu árini. Tað er tó longu ein stórur tørvur á at gera gøtur, og tí heldur Hagafelagið, at landið og kommunur eiga at arbeiða saman um at gera gøtur alt fyri eitt fyri tey fýra - fimm mest vitjaðu støðini. Uppgávan at gera gøtur hesi støð er helst bæði kostnaðarmikil og arbeiðskrevjandi. Mælt verður tí til, at fíggingin til tær fyrstu gøturnar kemur frá landinum, møguliga í samstarvi við privatar fyritøkur og Visit Faroe Islands. Tað kundi verið ein líknandi leistur, sum bleiv brúktur í Hvannhaga, har sherpa-trappur eru lagdar inn í brattlendið.

Gøturar skulu vera burðardyggar, sterkar og fella væl inn í lendið. Visit Faroe Islands hevur gjørt vegleiðing um gøtugerð og eisini Den Norske Turistforening, DNT[1]. Í vegleiðingini hjá DNT eru ymisk gøtusnið víst. Summi snið tola størri ferðslu enn onnur, og ferðslutrýst er eisini nakað, ið eigur at verða hugsað um, tá kommunur velja snið á gøtum. Í sama bóklingi er eisini vegleiðing til, hvussu gøtur kunnu fyrireikast og leggjast í samráð við eigarar og festarar.

Hagafelagið mælir til, at mynduleiknarnir eisini leggja dent á at gera gøtur til rørslutarnað og onnur, ið ikki eru før fyri at ganga langt ella mugu hava hjálp til at flyta seg. Hetta er umráðandi sæð frá einum heilsuperspektivi og í mun til inklusjón, tí vit vita, at náttúran er hon góð bæði fyri kroppsligu og sálarligu heilsuna og hjálpir okkum at byggja brýr millum menniskju.

Tá gøtur verða gjørdar, er tað umráðandi at eisini skikkaðir myndugleikar, ið sambært náttúruverndalógini og øðrum viðkomandi lógum, verða partar av tilgongdini.

Til § 9. Skilhaldsreglur
Her er talan um eina áseting, ið gevur jarðareigarum og brúkarum alt ov stóra heimild til at avmarka atgongdina til náttúruna, eisini fyri føroyingar. Hagafelagið mælir til, at almennar skilshaldsreglur lýstar í kunngerð verða galdandi, og ikki 29 kommunalar útgávur, og at avmarkingar bert verða gjørdar, har serligur tørvur er á tí, t.d. har nógv ferðafólk savnast. Tað er í verandi støðu fáar bygdir og støð. Somuleiðis verður í stk. 1 ásett og í viðmerkingunum víst til, at skilhaldsreglurnar ikki skulu skerja rættindini meiri enn neyðugt og bert í mun til umstøðurnar. Umstøður, sum í viðmerkingunum til § 9 verða avmarkaðar til staðbundin viðurskifti, so sum at vísast skulu fyrilit fyri viðbreknum lendi og djóralívi. Í roynd og veru hoyra hesi viðurskifti til førleikaøkið hjá skikkaðum myndugleika, sum skal meta, um neyðugt er at verja náttúruvirðir sambært Náttúruverndarlógini.

Til § 10. Yvirtøka
ST-sáttmálin um lívmargfeldi varð samtyktur í Rio De Janeiro í 1992. Í 1996 tóku Føroyar undir við sáttmálanum og bleiv hann lýstur í Føroyum við bekendtgørelse nr. 142 af 21.

[1] https://www.merkehandboka.no/.../DNT_Merkehandbok_2019.pdf

november 1996 af Konvention af 5. juni 1992 om den biologiske mangfoldighed (Biodiversitetskonventionen). Sáttmálin áleggur limalondunum at røkja vistskipanir við atliti til lívmargfelli. Á uppfylgjandi COP-15 lívmargfeldisráðstevnuni í 2022 í Montreal, Kanada var gjørd altjóða semja nevnd Kunming-Montreal Global Biodiversity Framework, ið áleggur limalondum m.a. sum mál fram móti 2030 at tryggja at missur av týðandi vistskipanum steðgar og at 30% av øllum landaøki verður vart.

Hagafelagið mælir tí til, at landið umhugsar at taka nøkur øki, har landsjørð er, burtur úr festiskipanini. Hetta við atliti til at skipa summi øki uttan landbúnað og heldur gera tjóðgarðar o.l. sbrt. lógini um náttúruvernd.

Til § 11. Trygd
Hagafelagið mælir til at § 11 verður flutt til § 6, stk. 2 pkt. 3, sum snýr seg um at gera ferðavinnuætlanir og skipa handilsliga ferðavinnu.

Orðingarnar tykjast lutvíst at vera endurtøkur í mun til § 6 og skapa ógreiðu. Hagafelagið er ímóti, at avmarkingar við stongsli og krav um ferðaleiðara verða lagdar á føroyingar. Viðmerkingarnar fara alt ov langt við at skriva um hálku og myrkur. Tað er væl rímiliga eyðsæð, at fólk brúka vit og skil. Her verður farið alt ov langt í eftiransingarhugburði. Orðingarnar í greinini benda á fremmandagering í mun til náttúruna, tá tosað verður um at steingja náttúruna ávísa tíð á árinum ella samdøgrinum, og eins og tosað verður um, at farið verður til handils ella til filmssýning. Náttúran hevur altíð verið opin. Skal hon nú steingjast? Við at fara út í náttúruna um kvøldið og náttina fáast heilt øðrvísi náttúruupplivingar og tilknýti til náttúruna, sum ásetingar í hesum lógaruppskotinum ikki eiga at taka frá fólki.

Til § 12. Ólógligar forðingar o. til.
Hagafelagið tekur undir við at gjaldsportur og -búir og aðar forðingar verða ólóglig.
Mælt verður til at orðingin "ongum er loyvt" verður brúkt ístaðin fyri "eigarar og brúkarar" í § 12, stk. 1, stk. 2 og stk. 3.

Verður mett, at landbúnaðurin í Føroyum hevur stuðul fyri neyðini, eigur hetta at verða skipað í landbúnaðarlóggávu sum landbúnaðarstuðul - og ikki sum gongugjald/gjaldsportur.

Til § 13. Náttúrugjald
Ferðafólk seta síni fótafar í øllum londum, har tey vitja í stórum tali. Tað er tí av alstórum týdningi, at inntøkur frá ferðavinnugjaldi í síni heild verða veittar til at bøta um tað fótafar, ið ferðafólk seta í okkara landi.

Almennu viðmerkingarnar á síðu 5, 4. reglubrot, benda eisini á, at ætlanin við náttúrugjaldinum er at fíggja kostnaðin av at útbyggja undirstøðukervi, ið er neyðugt at gera orsakað av fótafarinum, ið ferðafólk seta.

Hagafelagið mælir til, at land og kommunur alt fyri eitt fara undir at gera gøtur og bøta um viðurskifti, har mett verður at tørvurin er størstur á at bøta um umstøðurnar fyri ferðafólk. Umhugsast skal, um nevnda upphæddin á 150 kr pr ferðandi er nóg mikið at fíggja hetta arbeiðið. Eisini skal umhugsast, at landið letur eina byrjunarupphædd, soleiðis at arbeiðið kann byrja fyrr og skjótari kemst á mál.

Til § 14.
Viðv. stk. 2. Í stk. 2 eigur at verða ásett, at gøtur, ið kommunur gera, eru almennar.

Viðv. stk. 3. Hagafelagið kann taka undir við, at ein partur av náttúrugjaldinum verður nýttur til átøk, ið kunnu betra um umstøður og trivnað hjá fólki, ið búgva í bygdum, ið hava nógvar ferðafólkavitjanir.

Viðv. stk. 4. Hagafelagið er ímóti hesi áseting. Felagið heldur, at insitamentið til at hava brúksrætt til jørð í Føroyum, eigur at vera, at viðkomandi ynskir at reka og menna landbúnaðin – og ikki eitt ynski um at vinna pengar burtur úr atgongugjaldi til náttúruna. Fólk, sum hava jørð um hendi, bæði landsjørð og ognarjørð, hava serliga góðar møguleikar til at vinna pening við at bjóða tænastur út til ferðandi, um áhugi er fyri tí.

Sum grundregla er Hagafelagið ímóti, at landið gevur stuðul sambært stk. 4 til eigara og brúkara, ið ikki er eyðmerktur til ávíst tiltak, ið kann bøta um tað fótafar, ið stendst av ferðavinnuni. Tí tørvurin er stórur á at bøta um viðurskiftini í náttúruni, og væntaðu inntøkurnar røkka neyvan nóg langt til tann partin.

Viðv. 3. reglubrot á síðu 19. Hagafelagið heldur tað vera sera umráðandi, at nýttir kanningarhættir á ongan hátt kunnu eyðmerkja einstaklingar ella samtíðareyðmerkja fólk, men heldur við eftirfylgjandi dátuviðgerð. Hóast tað í viðmerkingum til § 14 verður sagt, at talan er um navnleysa skráseting, meinar Hagafelagið, at talan er um yvirvøku og skráseting av persónsupplýsingum. Tí treytar Hagafelagið sær, at tað verður neyvt ásett í kunngerð, hvør myndugleiki hevur atgongd til upplýsingarnar og at reglur verða fyri, hvussu upplýsingarnar verða goymdar, handfarnar og nýttar.

Til § 15. Boð
Ongar viðmerkingar.

Til § 16. Revsing
Ongar viðmerkingar.

Til § 17. Gildiskoma
Ongar viðmerkingar.

Viðmerking at enda:
Hagafelagið er til taks, um Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur spurningar v.m. og sær Hagafelagið eisini fram til møguligt høvi til at greiða nærri frá sínum sjónarmiðum til nevndarviðgerðina í Løgtingsins Vinnunevnd.

Vinarliga

HAGAFELAG FØROYA